# Kongafiskur, svartkalvi , upsi og útróðrarfiskur

**Fleiri skip hava landað til Fiskavirking á Tvøroyri hesa vikuna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Bæði trolarar, garnaskip, línuskip og útróðrarbátar hava landað á Tvøroyri í vikuni*

Sjálvt hjá einum stórum flakavirki, sum Fiskavirking á Tvøroyri er, er tað drúgt, sum kemur frá útróðrarbátunum, tá ið tað viðrar, og útróðurin er hampiliga góður.

Á virkinum arbeiða tey mest kongafisk, svartkalva og upsa, men í seinastuni hevur vignast hampiliga væl hjá bátunum, sum royna við línu og snellu.

Sum skilst á Martini Hentze, góðskuleiðara, hava útróðrarbátarnir fingið nógvan upsa, og onkran dagin hava fleiri bátar fingið yvir 3.000 pund.

Tað hevur eisini gingið væl hjá teimum, sum royna við línu. Besta »barometrið« í so máta er, at menn eru ikki nøgdir, tá ið veiðan kemur niður á 100 pund á línuna.

Tá ið vit frættu av Tvøroyri fríggjamorgunin, lá ein útróðrarbátur og avreiddi; teir høvdu verið við línu á vestara kanti á Munkagrunninum og veiðan vá umleið 2.000 pund.

## Trolarar, línubátar og garnaskip

Tveir djúpvatnstrolarar hava landað á Tvøroyri í vikuni, Rankin og Niels Pauli. Rakin hevði einar 1200 kassar, harav megin-parturin av veiðini var kongafiskur og upsi. Hinvegin var ein stórur partur av veiðini hjá NielsPaula svartkalvi.

Tvey onnur skip hava eisini landað á Tvøroyri í vikuni; Hoyvíkingur var við línufiski og Ólavur Hvíti, sum er á garnaveiði, hevði eini 40.000 pund av svartkalva.

Hvussu nógv Niels Pauli og Hoyvíkingur høvdu hendan túrin, hevði Martin Hentze ikki heft seg við.

Aftrat veiðini, sum løgd er uppá land á Tvøroyri hesa vikuna, hevur Fiskavirking á Tvøroyri eisini keypt eini 20.000 pund av svartkalva á uppboðssølu. Hetta var fiskur, sum garnaskipið, Oknin, landaði á Toftum.

# Alt fólkið heldur frí í senn

**– Soleiðis hava vit gjørt tvey ár á rað, og hetta hevur víst seg at rigga væl, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari á Fiskavirking í Miðvági**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Summarið kann mangan vera ein strævin tíð hjá virkjum og fyritøkum annars. Øll skulu vit hava eina summarfrí, og tá kann vera strævið hjá teimum, sum eftir eru.

Soleiðis er eisini á teimum virkjum, sum hava framleiðsluna gangandi alt árið. Tá ið nógv óroynd fólk loysa av, kann tað gerast strævið hjá teimum, ið eftir eru – og eisini hjá leiðsluni, sum skal syrgja fyri, at alt gongur væl.

## Øll frí í senn

Men summi virkir hava valt hina loysnina, sum er at leggja stilt nakrar vikur um summarið, so flest øll kunnu halda frí í senn.

Á Fiskavirking í Miðvági fara øll at halda summarfrí í viku 29, 30 og 31; tað er frá vikuni beint eftir vestanstevnu til nakrar dagar eftir ólavsøku. Byrjað verður aftur á virkinum, 5. august.

Albert Ellefsen, virkisleiðari, sigur, at soleiðis hava tey gjørt í tvey ár, og hetta hevur víst seg at rigga væl.

## Vesturtúgvan landaði mánadagin

Vesturtúgvan landaði annars í Miðvági mánadagin. Teir høvdu eini 50.000 pund av upsa og 30.000 pund av toski. Nakað var eisini av øðrum fiskasløgum.

Fiskavirking í Miðvági hevur eisini keypt fisk á uppboðssølu, soleiðis at nóg mikið av fiski hevur verið til allar dagarnar í vikuni.

Albert Ellefsen sigur, at minni fiskur er á marknaðinum í løtuni.

Hann heldur, at tíðin og veðurlagið hava spælt inn í seinastuni.

– Her hevur tó verið nóg mikið at gjørt hvønn dag; so vit skulu ikki klaga, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking í Miðvági.

# Slakari fiskiskapur og færri skip

**Á Fiskavirking í Vestmanna leggja tey stilt tríggjar vikur í summar. Fólkið fer til hús hálvan juli og heldur frí tær næstu tríggjar vikurnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Fiskavirking í Vestmanna verður stongt tríggjar vikur í summar – frá hálvum juli og tríggjar vikur fram*

Fiskiskapurin hjá trolarunum, sum royna eftir upsa, er munandi slakari nú, enn hann hevur verið megin-partin av hesum árinum.

Hetta merkist eisini á rávørutilgongidini hjá flakavirkjunum.

Á Fiskavirking í Vestmanna vísa tey á, at tað er ikki bara fiskiskapurin, sum er minkaður, men skip hava eisini lagt seg eftir øðrum fiskasløgum.

– Fyri góðum mánaði síðan fóru Eysturbúgvin og Vesturbúgvin á gulllaksaveiði, og teir plaga at fiska gullaks til síðst í august ella fyrst í september – alt eftir, hvussu fiskiskapurin verður.

Í Vestmanna vita tey eisini at siga, at Grønanes fer niður til Danmarkar í dokk síðst í hesum mánaðinum, og ivasamt er, hvat Vesturtúgvan fer at gera, meðan »makkarin« er í Danmark.

## Minni fiskiskapur

Nøgdirnar, sum skipini føra til lands nú, eru ikki á leið tær somu, sum fyrr í vár. Skipini, sum komu aftur av túri, vóru støðugt full undir lúkurnar. Í dag er gott pláss í lastini, tá ið túrurin er liðugur.

Fiskavirking í Vestmanna keypti fiskin hjá Grønanesi og Fram í vikuni. Grønanes hevði 64.000 pund av upsa, og Fram hevði 90.000 pund av upsa. Bæði skipini høvdu eitt sløð av øðrum fiskasløgum.

Aftrat veiðini hjá Grønanesi og Fram, hevur virkið í Vestmanna eisini fingið nakað av upsa frá Fiskavirking í Saltangará.

– Hetta hevur tilsamans verið nóg mikið til hesa vikuna, siga tey í Vestmanna.

## Frí í 3 vikur

Á Fiskavirking í Vestmanna leggja tey eisini stilt tríggjar vikur í summar. Fólkið fer til hús hálvan juli og heldur frí tær næstu tríggjar vikurnar.

– Vit plaga at hava ein summarsteðg í 14 dagar, men hesaferð verður steðgurin tríggjar vikur, siga tey á Fiskavirking í Vestmanna.



# Løgtingið á frímerki

**Í sambandi við at 150 ár eru liðin, síðani Føroya løgting varð endurstovnað, hevur postverkið prentað frímerkir, sum heiðra Løgtingið á hesum stóra degi**

FRÍMERKIR
*Stefan í Skorini*



*Stjórin í Postverki Føroya Bergur Berg stendur uppi, meðan Edmund Joensen, tingformaður, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, sita. Postverkið heiðrar løgtinginum við tveimum frímerkjum, nú liðin eru 150 ár, síðan tað varð endurstovnað*

*MYND: Jens Kr. Vang*

Ólavsøkudag í ár eru 150 ár liðin, síðani Føroya løgting varð endurstovnað. Løgtingið hátíðarheldur dagin við at geva út eina bók um søgu løgtingsins, men Postverk Føroya gevur í hesum sambandi út tvey frímerki, ið avmynda nakrar søguligar lutir, sum hava samband við tingið.

Mánadagin vóru frímerkini avdúkað á eini lítlari samkomu á frímerkjadeildini á Argjum. Har fekk løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, handað ein fyrstadagsbrævbjálva við frímerkjunum á.

Annað frímerkið avmyndar seyðabrævið frá 1298, og hitt avmyndar Gerðabók løgtingsins frá 1852, tá løgtingið varð endurstovnað. Hetta eru tveir týdningarmiklir lutir frá søguni hjá tinginum. Á blokkinum, sum frímerkini eru í, eru eisini avmyndað elsta varðveitta innsigli tingsins og perman á tingbókini frá 1852.

Føroya løgting var við kongaligari fyriskipan avtikið í 1816 og stovnað av nýggjum við ríkisdagslóg frá 26. mars í 1852. Endurstovnaða løgtingið hevur tó røtur heilt aftur í landnámstíð.

Upprunaliga var tingið eitt alting, sum hevði bæði dómsvald og løggávuvald. Útinnandi vald var einki í landinum. Tað var tí ættin, ið setti eitt nú dómar altingsins í verk.

Tingbøkurnar og skjøl løgtingsins frá 1852 til okkara dagar eru í varðveitslu á Føroya landsskjalasavni. Harumframt eru tingbøkurnar 1615-1816 á Landsskjalasavninum. Hesar bøkur og skjøl goyma tær mest týðandi keldurnar til Føroya søgu.

## Fegin formaður

Løgtingsformaðurin var sum vera man fegin um, at Postverk Føroya hevur tikið stig til at heiðra løgtingið á hesum stóra degnum.

Hann helt, at Postverkið ger eitt týdningarmikið arbeiði við at gera Føroyar kendar runt um í heiminum. Frímerkjadeildini hevur nógvar haldarar, ið fáa øll tey nýggjastu føroysku frímerkini sendandi við postinum. Frímerkir eru framvegis næststørsta útflutningsvøran hjá Føroyum.

Løgtingið sjálvt hevur eisini tikið stig til at hátíðarhalda dagin. Um stutta tíð kemur nevniliga ein nýggj bók um løgtingið.




Í dag 22/6 hava vit opið frá kl. 11.00 til 17.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Upp til 15.000 kr. í avsláttri

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Saxo 1,5D 3h reytt<br>km. 64.500, árg. jan. 2000<br>99.000,- | Citroen ZX 1,9D stc. 5h<br>km. 89.000, árg. mars 1996<br>86.000,- | Citroen Xsara 1,6i stc.<br>km. 36.000, árg. apr. 1999<br>133.000,- |
| Citroen Jumper Ch. v/last<br>km. 120.000, árg. aug. 1998<br>130.000,- | Citroen Xantia 1,9TD<br>km. 60.000, árg. feb. 1998<br>118.000,- | Mitsubishi Galant 2,0<br>km. 150.000, árg. juni 1992<br>37.000,- |
| Citroen Xsara 1,6i 5h<br>km. 30.000, árg. feb. 1998<br>107.000,- | Citroen Xantia 1,8i 16V<br>km. 63.000, árg. okt. 1996<br>112.000,- | Mitsubishi Pajero 2,8TDi GLS 5h<br>km. 40.000, árg. sept. 1998<br>185.000,- |
| Citroen Xsara 2,0 HDi 5H<br>km. 90.000, árg. nov. 1999<br>145.000,- | Citroen Saxo 1,5D 3h grátt<br>km. 25.000, árg. jan. 2001<br>116.000,- | Mitsubishi Pajero 2,8TDi GLS 5h<br>km. 82.000, árg. sept. 1997<br>177.000,- |
| Citroen Xsara 1,9TD 5H<br>árg. juni. 1999<br>137.000,- | Citroen Berlingo 1,9D<br>km. 81.000, árg. sept. 1998<br>109.000,- | Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820